# Vónleyst hjá hotellunum at umsita rúsdrekkalógina

Sambært rúsdrekkalógini skal gjaldast kontant fyri alt rúsdrekka. Men frá hotellunum verður upplýst, at tað er vanligt, at gestirnir eisini fáa drykkjuvørur upp á rokningina, sum verður send til fyritøkuna.

ELI GUTTESEN

– Tað er vanligt, at tá t.d. landsstýrið, løgtingið ella almennir stovnar hava vitjan úr øðrum londum, so senda vit alla rokningina til viðkomandi myndugleika. Rokningin fevnir alóftast um gisting, mat, telefonsamrøður og drekkivørur, sigur ein hotelstjóri.

Tað eru mini-barrir inni á nærum hvørjum hotelkamari, so tað er sera freistandi hjá gestunum at royna okkurt leskiligt, hóast prísirnir mangan eru ræðandi fyri útlendingar. Men tá teir ikki skulu gjalda tað sjálvir, er eingin grund at halda seg aftur.

– Tá vanlig fólk koma inn av gøtuni og biðja um kamar, verða tey spurd í avgreiðsluni um tað skal vera við ella uttan mini-bar. Velur gesturin kamar við mini-bar krevja vit vanliga depositum fyri virðið í barrini. Verður einki rørt fær viðkomandi peningin aftur. Men tá talan er um fyritøkur og stovnar, er ikki talan um depositum. Tá verður alt skuldskrivað fyritøkuni og vit senda síðan rokning. Hetta fevnir eisini um rúsdrekka og aðrar drykkjuvørur.

Av og á hava staðist trupulleikar av hesum, tá fyritøkan ikki hevur viljað goldið, men alóftast eru eingir trupulleikar við hesum. Tá vit hava fingið trupulleikar av eini rokning er tað alóftast tí, at viðurskiftini millum gestin og fyritøkuna ikki hava verið í lagi, sigur hotelstjórin.

## Lógin

Sambært grein 8 í kunngerð nr. 60 frá 7. mai 1992 um skeinkingarloyvi, kann rúsdrekka ikki verða latið upp á borg til einstaklingar. Brot á hesa reglu kann geva upp í eitt ára fongsul.

Men hotellini upplýsa fyri Dimmalætting, at vónleyst er at umsita hesa reglu eftir lógartekstinum. Um t.d. ein handilsferðandi útlendingur bíleggur ein enskan buff við reyðvíni afturvið, so verður ikki kravt, at hann leggur peningin á borðið, áðrenn skonkt verður í glasið. Vanliga mannagongdin er, at goldið verður við fráferð ella at rokningin verður send fyritøkuni maðurin umboðar.



Palliba og Marsanna kunnu ikki fáa eina slíka inn á hotelkamarið uttan at gjalda depositum fyrst. Men prominentir útlendskir gestir kunnu leska sær sum teir vilja upp á almenna rokning til Palliba og Marsannu.
Mynd: Kalmar Lindenskov



Leygardagin fær almenningurin høvi at vitja nýggju býráðshúsini í Runavík

# Runavíkingar fáa nýggj býráðshús leygardagin

Herfyri samtykti Runavíkar Býráð at keypa fyrrverandi bygningin hjá Sjóvinnubankanum til kommununa. Leygardagin verður farið í nýggju býráðshúsini.

SNORRI BREND

Tá Runavíkar býráð í januar mánaði samtykti at ogna sær henda bygningin so var tað við einum í huga: At útvega umsitingini í kommununi betri umstøður. Og tað fáa teir eisini í tí 560 fermetra stóra bygninginum.

Hesa seinastu tíðina hevur verið arbeitt við at flyta ymiskt frá gomlu skrivstovuni yvir í ta nýggju, og verður skrivstovan í hesum sambandi afturlætin í morgin. Men leygardagin skal hetta arbeiðið vera liðugt.

Leygardagin ætlar so býráðið at bjóða borgarunum í kommununi at hyggja eftir nýggju og snotuligu býráðsskrivstovuni, tá skipað verður fyri móttøku millum kl. 15 og 18.

Í samband við hesa móttøkuna verður sett upp eitt sjálvtøkuborð við kaffi og øðrum. Og sum undirhald fara Graeme Rudd, Stamen Stanchev og hornblásarar at luttaka.

## Til ymiskt virksemi

Við nýggju býráðshúsunum fær umsitingin í kommununi munandi betri umstøður. Í fermetrum er vøksturin úr 320 upp í 560.

Í nýggja bygninginum eru tríggjar hæddir, har alt virksemið hjá býráðnum verður savnað, t.v.s. avgreiðslan og bókhaldið, formansskrivstova og tekniska deildin, eins og fundarhøli. Nýggi býráðssalurin er munandi størri enn tann gamli, heilar 70 fermetrar.

Men býráðið hevur eisini aðrar ætlanir við nýggju hølunum uttanfyri. Sunnanfyri eru umstøður at gera eitt torg, har góðir møguleikar verða fyri opnum og almennum tiltøkum.

Nýggja kommunuskrivstovan liggur beint yvir av teirri gomlu. Henda nýggja varð keypt fyri 2,6 mió. kr.

# 30 milliónir krónur afturat út úr Fossbankanum í ár

Tá 1997 er farið afturum bak, er trotabúgvið eftir Fossbankan so væl sum uppgjørt – og gongur alt sum ætlað, hava tey, ið eiga pening til góðar, fingið 70% av pengunum aftur úr bankanum

GEORG L. PETERSEN




Líka síðan Fossbankin fór á húsagang, hevur ávíst virksemi verið í bankanum. Í dag sita trý fólk eftir og leggja seinastu hond á bankans viðurskifti.

Flestu lánini eru søgd upp, og hinir peningastovnarnir hava í seinastuni verið rættiliga lagaligir at yvirtaka og umleggja uppsøgdu lánini.

Hildið verður, at tey trý fólkini kunnu fara til hús við ársenda, og tá kunnu advokatarnir leggja seinastu hond á og strika Fossbankan einaferð með alla.

Higartil hevur Fossbankin megna at útgjalda 60% til kravánararnar. Tað svarar til heilar 180 milliónir krónur.

Og áðrenn hetta árið er farið aftur um bak, skuldu 10% verið goldin afturat. Tað svarar í krónum til 30 milliónir. So heilt einki var ikki í bankanum, sum sostatt megnar at gjalda 210 milliónir krónur aftur.

# Bjarni Djurholm vil hava greiði á undirgrundini

Undirgrundin spøkir aftur. Nú hevur Bjarni Djurholm sett fyrispurning á tingi um tulking av heimastýrislógini, rættindi til ráevni í undirgrundini og um eitt notat um undirgrundarmálið, sum tingmaðurin biður løgmann krevja alment innlit í.

GEORG L. PETERSEN

Oljan sigst liggja og bíða eftir fyrsta borinum, og nú er umráðandi, at allar avtalur sum viðvíkja undirgrundini eru greiðar.

Upplýsingar í málinum hava verið heldur ymiskir, tí alt má tulkast í mun til okkara ríkisrættarligu støðu. Og spurningarnir hjá Bjarna Djurholm byggja eisini m.a. á hugtøk sum delegatiónsteori og avtaluteori, tá tað umræður heimastýrislógina.

Bjarni Djurholm viðgerð í viðmerkingum tær nærri umstøðurnar í øllum málinum um ráevnini í undirgrundini. Avtalan, sum Atli Dam og Poul Schlüter skrivaðu undir í desember 1992, er ikki heilt so einføld longur. Avtalurnar sum komu í lag við danir eftir bankaskrædlið í Føroyum, hevur nevniliga eisini rørt spurningin, hvørt danir skulu hava ein leiklut, tá farið verður at leita.

Løgmaður og skrivstovustjórin í forsætismálaráðnum, Steen Ryd Larsen, eru í hesum máli komnir við mótstríðandi upplýsingum. Í tí eini avtaluni stóð, at danskt vinnulív og myndugleikar skuldi við arbeiðið. Ein seinni avtala nevndi hetta ikki, og tískil kom løgmaður til ta niðurstøðu, at orðingin ikki var galdandi longur. Hesum vísti forsætismálaráðið aftur.

Og so vil Bjarni Djurholm hava meira at vita, eftir at eitt notat varð kunngjørt í sjónvarpinum. Har kemur danska umsitingin við ymiskum hugskotum um, hvussu oljuvinnan skal skipast í Føroyum við danskari luttøku.

– Tað eru nógvir ósvaraðir spurningar í viðurskiftunum Føroyar og Danmark ímillum. Hetta orsakar gitingar um viðurskifti, sum politiskt eru sera viðkomadi. Í viðmerkingum eru lýst nøkur ivamál, sum eiga at vera svarað, áðrenn landsstýrið enn einaferð skal samráðast við stjórnina, sigur Bajrni Djurholm í viðmerkingunum.



Bjarni Djurholm, løgtingsmaður